# Kingomenn í Miðlahúsinum

**Kingomenninir Niels Midjord og Petur Jákup Eliasen skaptu hugna í Miðlahúsinum í Vágsbotni týskvøldið.**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Gittarin var við til at geva hesi fullkomiliga streymleysu konsert meira lív*

Týskvøldið vóru Kingomenn í Miðlahúsinum. Teir báðir Kingo-menninir Niels Midjord & Petur Jákup Eliasen sungu vísir hjá Evert Taube og sálmar hjá Kingo. Kvøldið gjørdist sera hugnaligt, og blandið av Kingo og Taube, ið kundi tykst eitt sindur margháttligt, riggaði stak væl. Fólk tyktust sum heild væl nøgd við tiltakið

Eisini teir báðir, ið framførdu vóru væl nøgdir. Petur Jákup sigur við Sosialin, at hann helt hetta vera eini deilig høli at framføra í. Hann sigyr, at teir leggja dent á, at tiltøk eru so natúrlig, sum til ber. Tí var tað ein frægd at syngja uttan mikrofon, hetta loyva hølini og tað at ikki heilt nógv fólk var inni.

Niels og Petur Jákup hava sungið saman í eini 10-15 ár. Teir byrjaðu við Calypso løgum og Evert Taube, Calypso'in er farin av skránni, men Evert Taube løgini, ið Niels hevur umsett til føroyskt, hanga enn við.

Báðir hava teir sungið nógv í kóri, og tað er í hesum sambandi, at sálmar eisini eru komnir á skránna. Teir sungu onkran sálm í einum kóri og avgjørdu at gera meira við hetta. Petur Jákup greiðir frá, at Niels er Kingoserfrøðingur, og at hann hevur gott innlit í Kingo løg kring Føroyar. Nógv av løgunum, ið teir syngja eru av Strondum, og hetta er í stóran mun vísuløg, tí er blandið millum Kingo og Taube ikki heilt burturvið.



*Aftan á konsertina var høvi hjá áhoyrarunum at práta við teir báðar, her tosar Tórmóður Djurhuus við Niels Midjord.*

Petur Jákup sigur, at teir hava sungið fyri svium, bæði í Svøríki og í Fugloy, og hesir eru um at detta á afturpartin tá teir hoyra Evert Taube á føroyskum.

Enn er hugurin at syngja bæði Kingo og Taube stórur, tí eru ivaleyst nógv ár eftir í hesum báðum Kingomonnunum.



*Nøkur løg vóru sungin uttan fylgispæl*

# Kendir føroyingar og arbeiðslív í Oynni

**Í hesum døgum er listaskálin, Oyggin, á Tvøroyri, karmur um forvitnisliga og fjølbroytta framsýning**

FRAMSÝNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Listahugað í Suðuroy hava í hesum døgum høvi til at síggja eina forvitnisliga og fjølbroytta frams‡ning í listaskálanum Oynni, á Tvøroyri.

Frammanundan hava vit skrivað, at Finnleif Mortensen sýnir fram málningar í Oynni- og har eru nógv av myndevnunum eisini úr Suðuroynni.

Men nú er italski listamaðurin,Gianfranco Nonne, sum býr í Vági, eisini farin at sýna fram í oynni.

Hann málar ikki, men arbeiðir við leiri, bronsu og gipsi.

Hann hevur tvey høvuðsmyndevni á framsýningini og tað eru arbeiðslív og kendir føroyingar.

Á framsýningini eru nevniliga fleiri bringumyndir av kendum, føroyskum rithøvundum og skaldum. Men hann hevur eisini gjørt fleiri relief, sum lýsa arbeiðslív í Føroyum, helst fyrr í tíðini. Talan er um relieff av monnum, sum koma aftur av útróðri, sum skera lippur og sum fást við fugl. Og har eru eisini myndir av konufólki, sum vaska fisk.

Framsýningin er opin hvønn dag, uttan mánadag, frá klokkan 15-18.



*Hendan bringumyndin av Martini Joensen, rithøvunda, er eitt av verkunum hjá italska listamanninum, Gianfranco Nonne í Oynni á Tvøroyri*

## Side Effect ovast á altjóða hittlista

Føroyski teknorokkbólkurin Side Effect ger veruliga um seg á tónleikaheimasíðuni soundlift.com, teir byrjaðu beinanvegin at leita sær upp eftir listanum yvir mest niður tiknu løg á síðuni. Teir lógu ovast á listanum yvir tekno-rokk løg týsdagin, og nú hevur lagið hjá teimum Kaos leita sær upp á ovastu rók á sjálvum hittlistanum yvir øll løg á síðuni.

Á Soundlift.com liggja nógv løg hjá nógvum bólkum, og á síðuni ber til ókeypis at taka løgini niður. Á síðuni liggur millum onnur bólkurin Wheatus, ið hevði eitt heimsumfatandi hitt, við lagnum "Teenage Dirtbag".

**nud**